## DAGSINS MEINING

# Heimur uttan fyri ES

ES grundlógin er í hesum døgum til viðgerð í ES limalondunum. Spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer hesum viðvíkjandi, ikki minst hvat fransmenn fara at siga seinni í mánaðinum. Tað er nú einaferð so í ES høpi, at um fransmenn fara á bakbeinini, so verður einki gjørt.

ES grundlógin kemur at hava eina ávísa ávirkan á okkum, eins og ein og hvør broyting í umheiminum hevur tað. Um ávirkanin verður so stór, sum tey meira bjartskygdu og ikki minst tey meira dapurskygdu vilja vera við, tað loyva vit okkum at ivast í.

ES er ikki neyðvendigvís ein svart hvítur spurningur um uttanfyri ella innanfyri. Millum at verða heilt uttanfyri og heilt innafyri, eru ein ørgrynna av millumloysnum, sum kunna og eiga at verða kannaðar politiskt. Tað ber ikki til, at vit sjálvi ganga og seta okkum avmarkingar ella finna uppá umberingar, sum til dømis at einki ber til, uttan at vit føryingar gerast ein sjálvstøðug tjóð. Tær Kanarisku oyggjarnar hava eina serskipan, hóast partur av Spanien, og Kanaloyggjarnar hava somuleiðis serstøðu, hóast partur av Bretska ríkinum. Alt ber til, har politiskur vilji er til staðar.

Vit eiga eisini at steðga á, og hugsa um teri fyrimunir, vit hóast alt hava við ikki at verða ES limur. Vit kunnu hava lóggávu, ið ikki samsvarar við ES. Hóast hetta, so kopiera vit nærum alt úr Danmark og avlíva harvið ein av fyrimununum, ið vit hóast alt hava. Politikarar eiga at seta seg niður og arbeiða uppá at fáa sum mest burturúr tí støðu, vit eru í í løtuni, heldur enn at grenja um, hvat ikki ber til mótvegis ES.

Tíverri er hetta ikki sermerkt fyri politisku skipanina. Hetta gongur eisini aftur í vinnuni. Vinnan hevur hug at fokusera alt ov nógv uppá, hvat ikki ber til í samband við ES, heldur enn at arbeiða út frá teimum møguleikum, ið eru í núverandi støðu. Onkur undantøk eru, har virkir hava dugað at stovnsett feløg í ES londum og meira týdningarmikið uttanfyri ES. Heimurin steðgar ikki við ES markið. Kanada, USA, Asien, Afrika, Australien og Miðeystur eru alt risastórir marknaðir við ótømandi møguleikum, og tað er eingin orsøk at rokna við, at føroysk vinna fer at klára seg væl innanfyri ES ella við ES fyrimunum, um hon ikki klárar at vinna pening globalt í núverandi støðu.

Føroyskir einstaklingar klára seg væl í Íslandi, Kanada og aðrastaðni. Hvussu ber tað til, at føroyska vinnan, við heilt einstøkum undantøkum, tykist nógv minni dynamisk og tykist brúka alt ov nógva tíð uppá at fokusera uppá avmarkingar og lokala plasering, heldur enn at fara út í tann víðopna heimin? Tora vit ikki at satsa uppá fólk við ótraditionellum hugskotum og ótraditionellari bakgrund? Tora vit ikki at perpektivera heimin øðrvísi, enn útfrá einum donskum/ES sjónarhorni.

Hetta hevur einki við okkara støðu í ríkisfelagsskapinum at gera, og hevur lítið við støðu okkara til ES at gera. Hetta handlar um at brúka teir til eina og hvørja tíð verandi møguleikar og at hugsa globalt heldur enn regionalt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eru menniskjuni komin frá apunum?

**Eyðun Mohr Viderø**



Vit læra í bíbliusøguni, at alt upprunaliga varð skapt, so sum hav, land og loftrúm, og síðani alt livandi so sum fiskur og hvalur í sjónum, fuglar, ið kundu ferðast í luftini og djórini á jørðini. Seinast og yvir øllum varð skapt ein hægri vera, menniskjan, ið skuldi hava tamarhald á øllum øðrum livandi.

At soleiðis er hóttað, kunnu vit sjálvsagt ikki prógva, men fyri at halda hetta vera rætt, skal ein trúgv til. Og hóast trúgvin í mangar mátar er veik, so stendur ivin eftir, hvussu alt kann vera so vísiliga sett saman, uttan at ein hægri makt hevur verið uppi í!!

Millum tey vísu og skúlaðu eru settir mangir tankar fram, hvussu alt er vorðið til av tilvild, at menniskjan við sínum sermerkta vísdómi er ein grein av djóraheiminum-frá apunum-, og hevur ment seg hagar, hon er í dag!

Hetta kann heldur ikki prógvast, men verður í tí sambandi víst á, hvussu nógv menniskju í kroppsliga uppbygninginum líkjast apunum, at hetta má vera tekin um, at vit hava ment okkum frá apunum til tað, vit eru í dag!

Hetta seinna kann vera rættuliga áhugavert at hyggja eitt sindur nærri at, og lættast er at ferðast í heimliga umhvørvinum.

Tey vísu í okkara samfelag, ið vit frætta mest frá, eru okkara politikarar og fjølmiðlafólk. Onnur eru mest aftan læstar dyr og koma dagliga ikki fyri mannaeygu ella oyru, kanska við undantaki av einum "professara", ið kannar kyksilvur í mongum livandi, so sum hvali v.m., tí hetta tungmetal er so heilsuskaðiligt, men nú er funnið kyksilvur í einum hári frá menniskja, ið langtsíðan er deytt, men sleit kortini kanska høgan aldur?!

Í seinastuni hava vit verið vitni til heilaverkið hjá okkara "klóku" politikarum, og hvat sigur tað so okkum um henda vísa partin av mannaættini?

Fyri at taka tvey dømi úr politiska leikinum, so er fyrst at nevna álitið frá Vinnunevndini, har samd nevnd mælti til at broyta upprunauppskotið frá Landsstýrinum um upp- og afturlatingartíðir soleiðis, at ikki er loyvt handlum at halda opið millum kl. 10 og 14 sunnu-halgidagar. Var hetta væl umhugsað av okkara vísu? Tað hildu teir, inntil teir varnaðust, at sjálvt andaligu hirðarnir flentu at teimum, so hendi tað, at eingin av limunum í vinnunevndini atkvøddi fyri teirra egna broytingaruppskoti, tá hetta kom til viðgerðar í løgtinginum!!!???

Eg var staddur eystanfyri Fugloynna við trolara eftir upsa, og góða tíð áðrenn hálast skuldi hevði sjónvarpið sending við kjaki millum Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal, leiddir av Boga Godtfred um uppskot samgongunnar viðvíkjandi nýggjum-broyttum sáttmála millum Føroyar/-Danmark um rættindi Føroya at tingast og gera sáttmála við onnur lond.

Fyrst er at siga, at blaðmaðurin var alt ov einvísur til at royna at fella løgmann, og hann kláraði ikki ella vildi als ikki stýra orðaskiftinum. Tað var undir alt lágmark, hvussu fremstu politikkarar okkara ikki dugdu vanligan fólkaskikk, og lótu ikki hvønn annan fáa frið siga sína meining, uttan at blanda seg upp í og avbróta røðaran, og tí var orðaskifti einki vert! Fylgi vanliga sera væl við í politiskum viðgerðum, men í hesum føri var eitt at gera, og tað var at sløkkja sjónvarpið. Ikki gjørdist mætari, tá málið endaliga kom til viðgerðar í løgtinginum. Ein løgfrøðingur frá løgtingsskrivstovuni, ið er seinasta trygd fyri, at mál til løgtingið eru greið og borðbar, ger vart við, at málið við sínum orðaljóði í tvinnanda tekstum og meiningum er uttan týdning! Hesin varð ikki tikin fyri fult, og var tað neyðugt, so er løgið, at viðkomandi ikki verður sagdur úr starvi!

### Hvør er so upprunastøðan hjá apunum?

Út frá millum annað omanfyrinevndu dømum um førleikan hjá okkara vísu,og afturgongdina í vanligari fornuft, so gjørdist mær greitt við støði í læruni um, at menniskjan hevði ment seg fram um apurnar, at tað er menniskjan, ið lækkar í skili og endar sum apa, so má niðurstøða vera tann øvugta av tí vanliga hildna, og tí setti eg mær spurningin: Hvør kom fyrr- menniskjan ella apurnar? Og niðurstøða mín er heilt einfalt, at: Apurnar eru komnar frá menniskjunum!

Tungmetallir eru vandamikil fyri heilsu okkara, men okkara "tungu" professarar og politikkarar eru helst enn vandamiklari í tyngd teirra á lønarlistanum hjá landskassanum!!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.